## Fyrsti stórdysturin

**Hóast kappingarárið enn er ungt, so verður longu leygardagin møguleiki at síggja klassikaran millum mansliðini hjá Kyndli og VÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Spenningurin er kanska ikki heilt tann sami nú, sum hann vónandi verður seinni á kappingarárinum. Men kortini munnu tað vera mong hondbóltsáhugað, sum gleða seg til fyrsta samanbrestin millum mansliðini hjá Kyndli og VÍF. Umframt at vera klassiskarin í føroyskum hondbólti, er talan eisini um meistaraliðini frá teimum báðum seinastu árunum, sum tørna saman, og í so máta kann dysturin fara at geva eina góða ábending um, hvussu tey bæði liðini eru fyri í nýggja kappingarárinum.

Tveir aðrir dystir verða eisini í manskappingini um vikuskiftið. StÍF skal annað vikuskiftið á rað til Havnar, og hesa ferð er tað í Hoyvíkarhøllini, at teir skulu royna seg. Somuleiðis skal Neistin spæla í Hoyvíkarhøllini, sum enn er heimavøllur hjá KÍF. Tann dysturin skuldi longu spælast fríggjakvøldið.

### Styrkisroynd í Vági

Hjá kvinnunum er eingin ivi um, at mest spennandi dysturin tykist vera tann í Vági. Har taka meistararnir úr VB móti Neistanum, sum í ár tykist vera ein av avbjóðarunum til gullið, og so er spurningurin, hvussu tann styrkisroyndin fer at fella út.

Eisini í Havn tykist talan gerast um spennandi uppgerð, tá VÍF vitjar Kyndil. Tey flestu munnu rokna við, at tað verður annað av hesum, sum fer at síkja seg við í endaspælið, og í so máta er eisini talan um áhugaverda styrkisroynd her.

Á Giljanesi skal StÍF á vitjan, og er hetta ein dystur millum tvey av liðunum, sum hava meldað út, at tað í ár skal roynast við lokalu kreftunum, og loksins skal Stjørnan á vitjan í Runavík.

TB-Skála:

# Fótbóltslag á Sevmýri

**Sagt verður, at sigurin á GÍ hevur gjørt mest sum undurverk við lagið í hópinum, og tí tykjast tvøramenn avgjørt at ætla sær stig, nú Skála kemur á vitjan**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað blásti av álvara lív í botnstríðið, tá TB seinasta sunnudag fyri fyrstu ferð í fýra mánaðir fór av vøllinum við trimum stigum. Og tað tykist eisini av álvara at hava blást lív í vónirnar hjá tvørafólki, at liðið somikið sannførandi var við yvirlutan móti einum av kappingarneytunum í botnstríðnum.

- Tað hevur í øllum førum verið nakað væl stuttligari at møta til venjing hesa seinastu vikuna. Stemningurin er vorðin ein heilt annar, og tú sært aftur, at menn gleða seg til venjingar, sigur liðformaðurin hjá TB, Óli Johannesen.



*Hesa seinastu vikuna hevur lagið verið munandi betri í TB-leguni, staðfestir liðformaðurin og toppskjúttin hjá liðnum*

Hann heldur, at vónirnar hjá TB avgjørt eru til stig, nú Skála kemur á vitjan, og hvat fólki viðvíkur, tykist liðið vera so væl fyri, sum tað nú einaferð er gjørligt.

Dan Mortensen er framvegis bæði skaddur og burturstaddur, og hann verður neyvan tøkur, fyrr enn til teir báðar seinastu dystirnar. Hartil hevur Jón Johannesen enn ein dag eftir av sínum leikbanni, so alt í alt talar tað fyri, at tað verður sama manning hesaferð, sum talan var um móti GÍ.

### Hópurin tynnist

Hjá Skála hevur tað verið nakað tunnligt í hópinum seinastu tíðina, nú skaðar av álvara hava gjørt um seg. Sum so er støðan ikki so nógv øðrvísi hesaferð, men fyri tað er eingin ivi um, at eisini teir fara eftir trimum stigum.

Men tað verður so uttan fleiri av teimum, sum ígjøgnum árið hava verið meira og minni fastir á liðnum. Vlada Filipovic og Arnhold Berg verða ikki við tað, sum eftir er av hesum kappingarárinum, og tað verður Sveinur Justinussen heldur ikki, eftir at hann er skurðviðgjørdur í knænum. Hartil er Milic Curcic leikbannaður, meðan Bárður Danielsen og Teitur R. Joensen farnir á námsferð, og eru teir tí heldur ikki tøkir í hesum umfarinum.

VB-NSÍ:

# Skert VB stríðist fyri stigunum

**Lyklaspælarar á miðvøllinum hjá VB verða ikki við sunnudagin, tá NSÍ jagstrar seinasta møguleikan fyri heiðursmerkjum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Tað verður eitt skert VB-lið, sum fer á vøllin sunnudagin, men tað er ikki nakað, sum spælararnir hava ráð at hugsa um, nú teir skulu stríðast fyri tilveruni í Formula-deildini*

Tað hevur gingið alt annað enn væl hjá VB seinastu vikurnar. Botnurin á stigatalvuni er støðugt komin nærri, og nú TB vann sær trý stig seinasta vikuskiftið, er nógv sum bendir á, at talan í næst seinasta umfarinum verður um sannan grannagysara á Sevmýri.

Teirri støðuni vilja vágbingar sjálvandi sleppa undan, og tí er nærum eitt krav, at trý stig verða fingin til vega sunnudagin, tá NSÍ vitjar.

### Skerdur miðvøllur

Men verður hugt at manningarlistanum, so stendur skjótt greitt, at VB ikki stendur við bestu kortunum undan dystinum. Ikki minst á miðvøllinum, har Edvard Ble fekk sítt áttanda gula kort í dystinum móti HB herfyri, og tí leibannaður. Samstundis stendur greitt, at Milan Kulic heldur ikki verður tøkur hesaferð. Vónin var annars, at hann við einari serligari masku um brotnu nøsina kundi spæla sunnudagin, men tað hevur víst seg, at brotið ikki var nóg pent, og tí var hann aftur lagdur undir skurð á hósdagin.

Hartil er Jón Krosslá heldur ikki tøkur, eftir at hann í einum arbeiðsóhappi meiddi sær nakrar vøddar í beininum, og somuleiðis er John Poulsen ivasamur, eftir at hann noyddist av vøllinum móti HB við liðbandsskaða.

### Royna møguleikan

Hjá NSÍ mundi seinasti møguleikin fyri gullinum fara, tá teir ikki megnaðu at taka øll stigini frá Skála mánakvøldið, men fyri tað ætla vespurnar sær at stríðast, tað sum eftir er.

- So leingi vit hava møguleika at klintra eitt fet ella tvey upp eftir talvuni, so ætla vit okkum at royna, eru boðini úr Runavík, har talan tykist vera um á leið somu manning, sum mánakvøldið royndi seg móti Skála. Tað vil siga, at hvørki Kári Hansen ella Gert Langgaard enn eru tøkir, eins og Ikechukwu Onyema framveigs er úri við skaða. Leikbann kenna teir einki til í Runavík í hesum umfarinum.